











# Góð og orkusparandi tvíhús

Talan er um eina verkætlan á Stóragerði, aftanfyri matvøruhandilin Inn á Landavegnum. Her verða 2 nýggj tvíhús bygd.

Umhvørvið á Stóragerði er friðarligt og barnavinarligt. Her er alt, sum tær tørvar. Her eru handlar, skúlar, ansingarstovnar og spælipláss, samstundis, sum tað er stutt til miðbýin.

Húsini eru øll eins, men speglvend í mun til hvørt annað. Stóru vindeyguni virka til, at tað verður ljóst og luftugt innan.

Húsini verða latin lyklaklár, tó verður partur av kjallaranum ikki innrættaður. Málað verður bæði innan og uttan.

Í ovaru hæddini er gongd, baðirúm, køkur, stova og trý kømur. Inngongd er í báðum hæddum og trappa er millum hæddirnar. Stova og køkur eru í einum. Eisini er stór og rúmlig altan út frá køkinum. Køkur, hvítvørur og baðirúmsmøblar fylgja við. Gólvhitið er í øllum húsinum.

Bjálving er 225 mm í loftinum/takinum og 250 mm bjálving í vegginum í stovuhæddini. Grundin og brandmúrur eru stoypt. Pláta verður uttan bæði í stovuhædd og kjallarahædd og klædningur gongur heilt niður. Takið er Alkorplan, sum er tað nýggjasta generatiónin innan papptak. 50 mm bjálving uttan á grundina/kjallarinum.

Prísurin er uttan bilhús, men tó fylgir byggiloyvið til bilhúsið við. Mvg-kvodan verður afturgoldin í mun til nær húsið verður selt.

Tú fært meira at vita um húsini hjá Skyn á tlf. 35 74 00 og www.skyn.fo og www.husasolan.fo

**Fakta:**

Adressa .......... Stóragerði, Tórshavn
Byggiár:........... 2009
Hæddir:........... 2
Stødd innan: ... 184 m²
Grundøkið: ..... 302 m²
Prísuppskot: ... Kr. 2.200.000,-

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**